| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>29. januar 2015 | Blað nr.: 1<br>Formansins merki: |

**GERÐABÓK**

**Dato:** 29. januar 2015 **Kl**. 17:30
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 01/15-18/15**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Rúni Djurhuus
Sjúrður Olsen
Sigrún Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**

**LUTTÓKU IKKI:**
Elin Lindenskov, sum hevði farloyvi

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18:00

## 5/15 Uppsamlingsmál ár 2015 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 5/15 | 15/00279-2 |

**Málslýsing**:
Elin Lindenskov hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Samtykt.

# 6/15 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 8/14 | 14/01236-1 |
| 10 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 182/14 | 14/01236-1 |
| 11 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 260/14 | 14/01236-1 |
| 12 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 207/14 | 14/01236-1 |
| 13 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 310/14 | 14/01236-1 |
| 14 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 236/14 | 14/01236-1 |
| 15 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 1/15 | 14/01236-1 |
| 16 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 6/15 | 14/01236-1 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 30/14 | 14/01236-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 48/14 | 14/01236-1 |
| 4 Býráðsfundir | 27.03.2014 | 52/14 | 14/01236-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 111/14 | 14/01236-1 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 83/14 | 14/01236-1 |
| 7 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 162/14 | 14/01236-1 |
| 8 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 133/14 | 14/01236-1 |
| 9 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 220/14 | 14/01236-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 04. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 27. mars 2014:** Framlagt og gókent.

Roknskapurin fyri mars og apríl 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri juni, juli og august 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri og september 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri oktober 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri november 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Framlagt og góðkent.

# 7/15 Útiøki hjá skúlum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 86/14 | 14/02822-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 211/14 | 14/02822-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 220/14 | 14/02822-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 229/14 | 14/02822-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 325/14 | 14/02822-1 |
| 6 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 246/14 | 14/02822-1 |
| 7 Mentamálanevndin | | | 14/02822-1 |
| 8 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 7/15 | 14/02822-1 |

**Málslýsing:**
Tilfar kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Útsett.

Mentamálanevndin 20. oktober 2014: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Eitt gott útiøki i skúlunum hevur stóran týdning fyri menning og trivnað hjá næmingunum. Í mai 2014 varð gjørd ein støðu- og tørvslýsing av útiøkjum hjá nøkrum av skúlunum í kommununi. Sambært henni er tørvar á umvælingum, útgerð og nýgerð í skúlagørðum í Tórshavnar kommunu.

Mentamálanevndin hevur samtykt ein yvirskipaðan skúlapolitikk (mál 2007-0504/4). Har stendur um útiøkið: "Uttanduraøkini og skúlagarðurin skulu verða kveikjandi og mennandi við tí í hyggju at stimbra samspælið við skúlans undirvísingarvirksemi." Í yvirskipaða skúlapolitikkinum verður eisini nevnt, at umstøðurnar til sosiala samveru skulu vera góðar.

Útiøkini í skúlum eiga at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm. Tað er umráðandi, at útiøki er stimbrandi fyri næmingin, gevur honum avbjóðingar og stuðlar honum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsu hjá tí einstaka.

Við støði í støðu- og tørvslýsingini hevur umsitingin gjørt uppskot til arbeiðsætlan fyri komandi árini, og hvat hetta er mett at kosta.

| | 2015 | 2016 | 2017 | |
|---|---|---|---|---|
| Skúlin á Argjahamri | 1.100.000 | | 400.000 | |
| Venjingarskúlin | 300.000 | | | |
| Sankta Frans skúli | 100.000 | | | |
| Eysturskúlin | | 500.000 | 300.000 | |
| Velbastaðar skúli | | 500.000 | 50.000 | |
| Hoyvíkar skúli | | 250.000 | | |
| | | | | |
| Tilsamans | **1.500.000** | **1.250.000** | **750.000** | **3.500.000** |

**Skúlin á Argjahamri**
Parturin av útiøkinum hjá Skúlanum á Argjahamri, sum er gjørt, er gott, men ov lítið til so nógvar næmingar.

Eitt uppskot er gjørt at gera garðin garðsbúnan, og gera økið klárt til, at ymisk spæliamboð t.d. til at klintra í kunnu setast upp. Uppskotið, sum er frá Hjálpirót, er lagt fram á skúlastýrisfundi og fundi í námsfrøðiliga ráðnum.

Sambært uppskotinum skulu ymsu útiøkini bindast saman við gøtuskipan, soleiðis at sambandið millum skúlan og fríøkið verður betri. Tað skal eisini plantast í økið fyri at skapa lívd og fríðka um, men neyðugt er at velja harðbalnar plantur, tí økið liggur høgt og har er opið fyri.

Eyka moldlag  skal leggjast á skráarnar, so plantast kann í teir. Ymsu økini verða gjørd til spælipláss.

Kostnaðarmetingin arbeiðið og útgerð er 1.440.000 kr. Henda kann spjaðast yvir tvey ár, t.d. 2015 og 2017.

**Venjingarskúlin**
Útiøkið hjá Venjingarskúlanum er bert og ikki nóg væl egnað til uttanduravirksemi.

Skúlastýrið í Venjingarskúlanum hevur i umsókn dagfest 2. desember 2013 biðið um játtan til útiøkið. Námsfrøðiliga ráðið í Venjingarskúlanum hevur eisini havt evnið á skrá og viðgjørt støðuna við útiøkinum nakrar ferðir. Skúlin er í ferð við at gera eina miðvísa ætlan, sum skal økja  um trivnað og rørslu hjá næmingunum. Ikki minst í hesum sambandi er umráðandi, at umstøðurnar uttandura eru góðar og mennandi fyri næmingarnar.

Foreldraumboðini og starvsfólkaumboðið í skúlastýrinum meta ætlanina hjá leiðsluni og námsfrøðiliga ráðnum í Venjingarskúlanum vera eitt sera gott átak, og heita tí á Tórshavnar kommunu at veita Venjingarskúlanum eina eykajáttan á 300.000 kr., sum skal brúkast til at menna útiøkið.

**Sankta Frans skúli**
Í august 2011 varð nýggi smábarnaskúlin tikin í nýtslu. Skúlagarðurin var tá illa farin av maskinum, sum vórðu brúktar í sambandi við útgrevsturin. Sostatt eigur garðurin at verða asfalteraður. Asfaltið i niðara garðinum er farið í støðum, so hann treingir til ábøtur.

Kostnaðarmeting fyri at asfaltera ovara skúlagarð og gera ábøtur á garðin er 100.000 kr.

**Eysturskúlin**
Vestanfyri Eysturskúlan við a-lonina er sokallaða grøna økið. Einki er gjørt við hetta økið, tað er ikki drenað og eingin girðing er. Hurðar eru í  øllum stovunum í a-lonini út í grøna økið. Ein gøta er fram við skúlanum millum Tórgarðsgøtu og Djóna í Geil gøtu.

Í 2006 var eitt uppskot gjørt fyri grøna økið, kostnaðrmetetingin er 1.000.000 kr. Verður uppskotið sett í verk, kann økið nýtast til skúlagarð og til undirvísing, tað ber til t.d. væl til at brúka í lærugreinum sum náttúru og tøkni, lívfrøði og heimstaðarlæru.

**Velbastaðar skúli**

Skúlagarðurin hjá Velbastaðar skúla verður mest brúktur til bóltspæl, og tá bóltspæl er í garðinum, ber illa til at annað virksemi er eisini. Skúlastýrið hevur saman við skúlanum víst á, at neyðugt er at býta skúlagarðin sundur fyri at skapa møguleika fyri fjølbroyttum virksemi í økinum.

Eitt uppskot frá skúlastýrinum og skúlanum er, at uml. helvtin av garðinum verður sparkivøllur við graslíki. Eingin sparkivøllur er á Velbastað, so ein sparkivøllur í skúlagarðinum verður óivað nógv brúktur – eisini eftir skúlatíð.

Kostnaðarmetingin er uml. 500.000 kr.

**Hoyvíkar skúli**
Útiøkini hjá Hoyvíkar skúla eru bygd upp soleiðis, at tey skapa umstøður fyri fjølbroytni, soleiðis at næmingar kunnu fáa hóskandi avbjóðingar í fríløtum, og tað ber eisini til at brúka partar av útiøkinum í undirvísing. Men har manglar útgerð.

Næmingar í Hoyvíkar skúla høvdu á vári 2014 evnisviku um trivnað, og í tí sambandinum hava næmingarnir fingið spurnarblað við heim um, hvussu teir trívast. Niðurstøðan er, at trivnaðurin er góður, men tey ynskja sær útgerð í skúlagarðin.

Mælt verður til at játta 250.000 kr. til útgerð til skúlagarðin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsipiella viðgerð.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Samtykt at kanna møguleikar fyri fígging, at leggja fyri nevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til fígging kr. 1,5 mió fyri árið 2015 sum fyrsta stig samsvarandi yvirltinum omanfyri. Mett verður skilabest at skipa játtanina sum rakstrarjáttan, sum mentamáladeildin umsitur samsvarandi teirri raðfesting, ið mentamálanevndin ger.

Uppskot til fígging: kr. 1 mió av íløgukontu 5775 L57016 Golfvøllur, og kr. 0,5 mió av stuðulskontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við uppskoti til fígging og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Málið um raðfesting av arbeiðum verður viðgjørt seinni.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við mentamalanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Marin Katrinu Frýdal, um heldur enn at játtað 1. mió av íløgukonto Golfvøllur, at játta arbeiði av íløgujáttan Fótbóltsvøllurin í Hoyvík.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:

Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Jákup Dam um, at allir skúlarnir í kommununi skulu takast við í raðfestingina, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 8/15 Útbygging av Hoyvíkshøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 6/14 | 14/00601-10 |
| 10 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 228/14 | 14/00601-10 |
| 11 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 4/15 | 14/00601-10 |
| 12 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 8/15 | 14/00601-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 66/14 | 14/00601-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 79/14 | 14/00601-10 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 199/14 | 14/00601-10 |
| 5 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |
| 6 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |
| 7 Mentamálanevndin | 03.09.2014 | 165/14 | 14/00601-10 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 184/14 | 14/00601-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 196/14 | 14/00601-10 |

**Málslýsing:**
Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 $m^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520$m^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr.

5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

Býráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tann 27. juni 2011 var lisitatión uppá útbygging av Hoyvíkshøllini. 4 tilboð komu inn. Úrslitið frá lisitatiónini tann var:

1. J & K Petersen kr. 4.733.029,33 u/ mvg
2. ÁTS kr. 5.182.139,75 u/ mvg
3. Búsetur kr. 6.010.299,24 u/ mvg
4. Articon kr. 6.291.903,00 u/ mvg

Metingin í byggiskránni nov. 2009 er kr. 4.224.000,- u/ mvg.

Lisitatiónsúrslitið kann tulkast sum ein staðfesting av, at áður gjørda kostnaðarmetingin, sum hevur ligið til grund fyri politisku viðgerðini, hevur verið so tíðliga í verkætlanini og á einum so mikið leysum grundarlag, at neyvleikin á henni er at rokna sum vegleiðandi.

Ráðgevin hevur kannað, um møguligt er at spara í tilboðsupphæddini og metir, at tað ikki er ráðiligt, tí hetta kemur at ganga út yvir umklæðingarrúmini, sum ikki verða tøk, um sparing verður gjørd. Tær sparingar, sum kundu komið uppá tal, eru longu gjørdar í byggiskránni og í projekteringini.

Kannað er eisini, hvar munurin millum byggiskrá og tilboð stavar frá. Í byggiskránni er ikki roknað við, at bygningurin kemur so langt niður á parkeringsøkið, sum tær neyvu uppmátingarnar í projektinum hava staðfest.

Tað er serliga hetta, sum ger seg galdandi, har "grundin" verður hægri, sum er frávikið millum tilboð og byggiskrá.

Umsitingin hevur tí eisini kannað møguleikan fyri at gagnnýta hæddarmunin á økinum til kjallara, so at hølir, sum stórur tørvur er á í hesi høllini, kunna gerast undir útbyggingini, ístaðin fyri at fylla upp.

Tilboð uppá hetta arbeiðið er heintað inn frá lægstbjóðandi uppá upprunaútbjóðingina.

Við støði í frágreiðing frá MAP Arkitektar, sum er ráðgevi á verkætlanini um útbygging av Hoyvíkshøllini, hevur tekniska fyrisitingin gjørt kostnaðarmeting av, hvat verkætlanin, íroknað allar útreiðslur, kann væntast at koma at kosta. Íroknað hesa kostnaðarmeting er eisini umlegging av fjarhitarørum sum koma at liggja undir byggingini, og sum Fjarhitafelagið krevur flutt.

Fíggjarlig viðurskifti:
Býráðið hevur áður játtað kr. 5.100.000,- tilsamans til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at taka av tilboðnum hjá J & K Petersen um upprunaliga tilboðið á kr. 4.733.029,33 u/ mvg og av ískoytistilboðnum á kr. 263.040,- at byggja fulla óinnrættaða veghædd undir umklæðingarrúmunum, og gera sáttmála við J & K Petersen um tilsamans kr. 4.996.069,33.

**Mentamálanevndin 8. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at taka av tilboðnum uppá kr. 4.996.069,33 frá J & K Petersen.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggimálið er komið fram, at neyðugt er at grava munandi longri niður fyri at koma niður á fast. Staðfest er, at neyðugt verður at grava eitt lag av mógvi burtur undan tilbygninginum, umleið 2,5 m., og fylla grótfyllu í aftur. Sambært upplýsingum frá Mikael Viderø, býararkitekti, verður kostnaðurin av hesum arbeiði umleið kr. 375.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta írestandi peningin kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 11. januar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 2 mió settar av til framhald at gera útbygningin lidnan innan. Harumframt eru umleið kr. 300.000 tøkar á verkætlanarkontuni 5775 L57006 útbygging av Hoyvíkshøllini.

Enn standa partar av miðhæddini, øll veghæddin og øll loftshæddin óinnrættað. Mett verður, at fyri hesa játtan ber til at gera eitt umklæðingarrúm aftrat og almenn wc í miðhæddini eins og møguliga partar av veghæddini (kjallarin), har ætlan er at gera vektrúm (venjingarhøli) og fundar-/felagshøli.

Í hesum sambandi skal útbjóðingartilfar fáast til vega fyri liðugtgerð av miðhæddini og veghæddini. Arbeiðið verður at bjóða út í innbodnari lisitiatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2 mió av íløguætlanini fyri 2014 til liðugtgerð av mið- og veghæddini, herundir at útvega útbjóðingartilfar og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at biðja umsitingina um at lýsa ætlanina fyri at gera forbygningin endaliga lidnan til næsta nevndarfund.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan er gjørd ein fyribils kostnaðarmeting fyri liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir. Umbidnu kostnaðirnir eru hesir:

- liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir,
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt umklæðingarrúm afturat
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt goymslurúm í staðin fyri umklæðingarrúm

Kostnaðarmetingar verða lagdar fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at fara á ástaðarfund á næsta nevndarfundi.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Nevndin hevur verið á ástaðarfundi.

Samtykt at biðja umsitingina um tilmæli við atliti at heildarætlanini og funktionalitet, tørvinum hjá felagnum og tøku játtanini.

**Ískoyti**
Í skrivi dagfest 5. juni 2014 metir nevndin í H71, at í løtuni er tað ikki fleiri skiftingarrúmum, sum størstur tørvur er á. Heldur hevur tað skund at fáa felagshølið á ovastu hædd gjørt klárt, eins og stórur tørvur er á at fáa venjingarhølið klárt.

Í tørvslýsingini frá 2009 er ikki lagt upp til, at H71 skal hava felagshøli í útbygninginum. Tað varð heldur ikki lagt upp til venjingarhøli í tørvslýsingini. Tað er tó møguligt at leggja bæði

felagshøli og venjingarhøli í útbygningin, tí at veghæddin kom aftrat í mun til upprunaligu verkætlanina við tveimum rættiliga stórum hølum (uml. 150 m2 í alt).

Metast má, at ovasta hæddin eigur at verða til meira almenna nýtslu eitt nú kafé í sambandi við kappingar, tiltøk, almennar fundir o.a., so sum tørvslýsingin eisini legði meira upp til.

Í mun til sjálva høllina er tørvur á goymslu og fleiri almennum wc. Til ber at gera goymslu í tí hølinum, sum upprunaliga varð ætlað til umklæðingarrúm. Til ber at gera umklæðingarrúm har seinni.

Mett verður skilabest, at tøka upphæddin kr. 2 mió verður brúkt soleiðis við støði í omanfyri nevndu funktiónslýsing: almenn wc og goymslu í miðhæddini, felagshøli og venjingarhøli í veghæddini. Gerast skal neyvari kostnaðarmeting, um játtanin røkkur til hesi endamál, og um ikki, hvat skal takast burturúr.

Ovasta hæddin við hartil hoyrandi atkomuviðurskiftum (lift) verður at bíða til seinni.

Felagið rindar sjálvt útgerð, innbúgv v.m. til felagshølið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2 mió av íløguætlanini konta 5775 Høllin í Hoyvík til at gera almenn wc og goymslu í miðhæddini, harumframt at gera felagshøli og venjingarhøli í veghæddini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt og útsett.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Við støði í umrøðuni á mentamálanevndarfundinum 24. juni 2014 kann staðfestast ávíst ynski um, at ovasta hæddin verður gjørd fyrst, og at arbeiði verður boðið út sum undirhondsboð, so at ein ítøkiligur kostnaður kann staðfestast.

Mælt verður til at halda fast í omanfyri nevndu funktiónslýsing, har ovasta hæddin eigur at verða til almenna nýtslu eitt nú kafé í sambandi við kappingar, tiltøk, almennar fundir o.a. Í sambandi við útboð eigur lyft at verða tikið við til tess at lúka krøv um atkomuviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til støðutakan um útbjóðing.

**Mentamálanevndin 03. september 2014:** Nevndin samtykti at bjóða arbeiðið at innrætta ovastu hædd út sambært funktiónslýsingini og krøvum til atkomuviðurskifti sum undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.´

**Ískoyti:**
Fyri at bjóða arbeiðið út í undirhondsboð, er neyðugt at gera útbjóðingartilfar, t.e. tekningar, sum vísa innrætting, og frágreiðing um tilfar. Umsitingin hevur í hesum sambandi tosað við MAP arkitektar, sum hava teknað uppíbyggingina, um at fáa til vega hetta tilfar.

Tilfar verður lagt fram.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Samtykt at bjóða arbeiðið út soleiðis, at talan er um eitt stórt rúm við neyðugum atkomuviðurskiftum, brunaveggi og fyrireikingum til leiðingar til køk, wc og annað el.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið bleiv boðið út til 2 arbeiðstakarar, soleiðis sum nevndin hevur samtykt.

Inn komu 2 tilboð, hesi eru:
- Bjarni Poulsen kr. 2.106.270 uttan mvg, j.nr. 14/04771-4
- Eysturlon kr. 2.860.528 uttan mvg, j.nr. 14/04771-5

Av tí at onki veruligt útbjóðingartilfar er, so er tað torført at meta um innkomnu tilboðini, herundir hvørjar veitingar eru við, hvat slag av tilfari verður nýtt, hvussu trappur, vindeygu, ljósarmatur o.a. verður.

Kostnaðarmering, út frá tilboðnum frá Bjarna Poulsen:

| | |
|---|---|
| Tilboð uttan mvg | kr. 2.106.270 |
| Lift typa 2, alt íroknað | kr. 250.000 (kostnaður íalt kr. 500.000) |
| Óvæntað 25% | kr. 526.570 |
| Handverkaraútreiðslur íalt | kr. 2.882.840 |
| MVG, 6,75% | kr. 194.590 |
| Eftirlit og byggileiðsla | kr. 200.000 |
| **Kostnaðarmeting íalt** | **kr. 3.277.430** |

Viðmerkjast skal, at tað verður neyðugt at fáa skikkað fólk til at hava eftirlit við el- og vhs-arbeiðinum.

Útbjóðingartilfarið hevur j.nr. 14/04771-1

Um samtykt verður at arbeiða víðari við málinum, er neyðugt at fara undir sáttmálasamráðingar. Tøk upphædd á íløgukontuni er kr. 2 mió, tí verður neyðugt við meirjáttan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til støðutakan um, hvørt arbeiðast skal víðari við tilboðnum.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, taka ikki av innkomnum tilboðum, av tí at játtanin ikki røkkur.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til at bjóða út liðugtger av bygninginum av nýggjum sum skjótast og útvega neyðugan pening til kostnaðin.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at beina málið í mentamálanevndina.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

# 9/15 Royndarverkætlanin - Tilbúgving í tøkum tíma (títt)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 24.11.2014 | 52/14 | 14/05133-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 233/14 | 14/05133-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 12.01.2015 | 1/15 | 14/05133-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 3/15 | 14/05133-1 |
| 5 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 9/15 | 14/05133-1 |

## **Málslýsing**:

**Royndarverkætlanin**
Endamálið við Tilbúgving í Tøkum Tíma er at sameina og styrkja um fyribyrgjandi arbeiðið í kommununi.

Royndarverkætlanin TÍTT er sprottið úr SSP samskipanini, sum hevur staðfest ein tørv á at styrkja um tað fyribyrgjandi arbeiðið í mun til børn undir skúlaaldri. Okkara egna barnaverndartænasta kann eisini staðfesta, at flestar fráboðanir eru í mun til børn yvir skúlaaldri, og at støðan tá ofta kann vera ring at bøta um.

Ynski er tí um at kunna seta fyrr inn og skapa positivar broytingar fyri familjurnar, áðrenn avleiðingarnar av mistrivnaði verða ov stórar.

Funnið er fram til danska verkætlanin TOPI (Tidlig Opsporing og Indsats), sum m.a. Viborg kommune hevur ment, og hevur hon fingið føroyska heitið TÍTT – Tilbugving í Tøkum Tíma.

Ætlanin er at verkætlanin skal royndarkoyrast frá 1. januar 2015 til 30. juni 2016.

Í royndarverkætlanin verður ljós varpað á trivnaðin hjá *øllum* børnum í aldrinum 0-10 ár í einari skipaðari tilgongd, har gjørligt verður at varnast møguligan mistrivnað og at seta inn beinanvegin.

**Arbeiðsháttur**
Við fokus á trivnaði verða øll børn í aldrinum 0-10 ár mett at vera antin í grønari, gulari ella reyðari støðu, og út frá hesum verða samrøður í fyrsta atløgu gjørdar við foreldur og í øðrum lagi við onnur fakfólk, við tí fyri eyga at bøta um trivnaðin.

Ymisk amboð eru ment til endamálið, eitt nú Trivnaðarskjøl, Greiningarfrymlar, Skiftisskjøl og ein Samrøðuleist, sum verður brúkt í samskiftinum við foreldur og í tvørfakliga samstarvinum.
Í einari einklari, men væl skipaða tilgongd, fáa starvsfólkini á dagstovnaøkinum sostatt nøkur amboð at varnast trupulleikar og seta inn við fyribyrgjandi tiltøkum í tøkum tíma.
Og ein skipan verður sett upp, sum tryggjar at samstarvið millum stovn og heim verður styrkt, at skiftið millum dagstovn og skúla verður samskipað, umframt at samstarvið millum stovn, heim og fyrisiting verður styrkt, ikki minst tá talan er um samstarv við Barnaverndartænastuna hjá kommununi.

**Royndir**
Royndirnar úr Viborg Kommunu siga, at ein felags tilgongd, eina neyva samskipan og nøkur ítøkilig amboð hava gjørt stóran mun fyri bæði foreldur, dagstovnaøkið og fyrisiting.

Nógvar trupulleikar verða nú loftaði so mikið tíðliga, at foreldur og starvsfólk í felag kunnu loysa trupulleikarnar, uttan at aðrir myndugleikarnar koma inn í málið. Onnur mál verða nú fráboðaði so mikið tíðliga, at til ber at seta inn við nógv minni umfatandi tiltøkum og meðan tað framvegis er møguligt at skapa positivar broytingar fyri familjurnar/børnini, so avleiðingarnar av mistrivnaði ikki náa at fáa so stóra ávirkan ella verða permanentar.

Verkætlanin hevur í Viborg kommunu viðført, at færri kostnaðarmiklar fyriskipanir nú verða settar í verk í mun til børn og teirra familjum, og hevur hetta gjørt tað møguligt at raðfesta ørðvísi og veita eina nógv betri og meira fyribyrgjandi tænastu.

**Luttakandi partar**
Føroyska verkætlanin fevnir um 3 kommunur í landinum: Hvannasunds kommuna, Eysturkommuna og Tórshavnar kommuna.

Í Tórshavnar kommunu er Eysturbýur valdur út, soleiðis at verkætlanin fevnir um Eysturskúlan og teir dagstovnar, sum eru knýttir hartil: Frítíðarskúlan Smílibýlið, Dagstovnin Lítlaskóg og Dagstovnin Birkilund. Talan er sostatt um umleið 225 børn og 60 starvsfólk.

Tveir námsfrøðiligar ráðgevarar frá Barna- og ungdómsdeildina verða knýttir at verkætlanina 2x10 tímar um vikuna fyri at tryggja, at starvsfólkini fáa neyðuga vegleiðing og stuðul í royndarverkætlanar tilgongdini.

Ein samskipanarbólkur er settur, við umboðum frá SSP, Sosialu deild og B&U. (Óli Rubeksen, Tine Lyager og Birgit Debess) Bólkurin skal umseta og framleiða tilfar og menna mannagongdir til tvørskipanarliga samstarvið og taka sær av møguligum avbjóðingum í royndarverkætlanartilgongdini.

Afturat samskipanarbólkurin verður ein arbeiðsbólkur settur, mannaður við dagstovna- og skúlaleiðarir, sum luttaka í verkætlanini. Arbeiðsbólkurin skal tryggja, at allir luttakandi stovnar eru gjølla kunnaðir og fáa neyðuga stuðulin til at iverkseta TÍTT í verki.

Ætlanin er, at SSP skal luttaka yvirskipað í verkætlanini og skipa fyri stuðlandi og førleikamennandi tiltøkum, eitt nú skeiði í “Neyðuga samrøðuni”.
Væntandi verður tørvur á tvørfakligum samstarvi og fakligari sparring í ávísum málum, og tí verður Barnaverndartænastan hjá kommununi knýtt at verkætlanina, so hvørt sum tørvur er á tí. Ilt er tó at siga júst hvussu hetta arbeiðið skal skipast, og í hvussu stóran mun hetta kemur at ávirka teirra virksemi. Partur av royndarverkætlanini er júst at gera okkum nakrar royndir í mun til hetta.

Væntandi fara tó nakrir fleiri fráboðanir at koma til Barnaverndartænastuna í hesum tíðarskeiði, og fer hetta sjálvsagt at krevja, at ressursir verða raðfestar á Sosialu deild at taka hond um hesar.

**Fígging**
Verkætlanin verður gjøgnumført innan verandi fíggjar- og starvsfólkakarmar. SSP ber kostaðin av innleiðandi og stuðlandi skeiðstiltøkum í tilgongdini, og vanligi raksturin fevnir um dagliga virksemi. Eyka lønarútreiðslur verða til námsfrøðiligu ráðgevarnar í verkætlanartíðarskeiðnum, sum fyri árið 2015 kann fíggjast innanfyri verandi játtan til námsfrøðiligu ráðgevingina kontu 3211.

Til ber ikki at siga við vissu, um avleiddar útreiðslur vera til eitt nú barnaverndartænastuna í sambandi við møguliga fleiri fráboðanir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og sosialdeildarleiðarin mæla ávikavist trivnaðarnevndini og mentamálanevndini til at taka undir við royndarverkætlanini.

**Trivnaðarnevndin 24. november 2014:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Málið umrøtt og útsett.

**Trivnaðarnevndin 12. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Biðið verður um at fáa til vega ávegis frágreiðing/eftirmeting í november 2015, og at heitið á verkætlanini verður broytt, so tað samsvarar betri við endamálið.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, taka ikki undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sigrun Mohr og Jógvan Arge, taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býráðslimir biðja um málið á skrá.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Helenu Dam á Neystabø, um at beina málið í mentamálanevndina við hesum arbeiðssetningi: at gera eina ætlan fyri fyribyrgjandi námsfrøðiliga arbeiðinum á dagstovnaøkinum, herímillum neyðug samstørv við aðrar partar, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

# 10/15 Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv á Argjum - Argir Bakkagøta og Argjaboða, smb. spillivatnsætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.01.2015 | 3/15 | 14/01987-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 2/15 | 14/01987-3 |
| 3 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 10/15 | 14/01987-3 |

## Málslýsing:

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at samla kloakkirnar á Argjum. Talan er um at skipa kloakkleiðing frá Kráargøtu og Bakkagøtu og leiða tær út á streymasjógv. Í løtuni verður stórur partur av spillivatni leitt út í Rossá, sum munnar út í fjøruna (víst verður til frágreiðing j.nr. 14/01987-4 og tekning j.nr. 14/01987-6).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2,8 mio. og er ynski um at fáa heimild at fáa PB Consult at gera útbjóðingartilfar klárt at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,25 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av útleiðingunum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 14/01987-5 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,25 mió. (við 6,25% MVG).

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 0,25 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) L68019 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

# 11/15 Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv í Kollafirði, smb. spillivatnsætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 52/14 | 14/01989-8 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 102/14 | 14/01989-8 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 101/14 | 14/01989-8 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 10.11.2014 | 29/14 | 14/01989-8 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.01.2015 | 4/15 | 14/01989-8 |
| 6 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 3/15 | 14/01989-8 |
| 7 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 11/15 | 14/01989-8 |
| 8 Kollafjarðarnevndin | | | 14/01989-8 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at savna kloakkirnar Við Sjógv í Kollafirði í skipaða leiðing. Talan er um at skipa kloakkleiðing frá Botnavegnum, Við Sjógv, Bøgøtu og Steinsgøtu og leiða tær út á streymasjógv. Sí tekning j.nr. 14/01989-6.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 1.950 mio. kr,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 14/01989-7, og er ynski um at fáa heimild at fáa Sp/f Martin E. Leo at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og seta arbeiði í verk. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í summar.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2014 er 4 mió. kr. og er ætlanin at nýta 1,95 mio. kr. til dagføring av útleiðingunum Við Sjógv í Kollafirði.

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 1,95 mio.kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2014, konto 6875 (Kloakkir) L68018 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tað verður støðugt arbeitt við at dagføra kloakkirnar í Kollafirði. Enn mangla nógvar útleiðingar á sjógv og kloakkering millum hús er komið væl ávegis. Stórt kloakkprosjekt við Sjógv skal til at byrja fyrsta dagin. Pengar eru játtaðir.

Nær arbeiðið at dagføra allar kloakkleiðingar og útføringar í Kollafirði, verður endaliga liðugt, er ilt at siga.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Umboð frá teknisku deild kunnaði varð um málið.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin 22. okt 2014 (j. nr. 14/01989-19) og inn komu 6 boð; av teimum var Maskingrevstur lægstur. Samlaði kostnaður var væl hægri enn upprunaliga mett sí (j. nr. 14/01989-7) og arbeiðið var eisini meira umfatandi og dagført. Sí útbjóðingartilfar (j.nr. 14/01989-14) Samlaði fíggjartørvur sambært (j.nr 14/01989-26) er sostatt kr. 4,0 mió. og er tí tørvur at fáa útvegað fígging álj. kr.  2,0 mió. afturat.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða upphæddin fyri markaðu íløgum fyri kloakkir í 2015 er kr. 3 mió. Konto 6875 og er tørvurin kr. 2,0 mió.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 2,0 mió. afturat til verkætlanina – fíggjað av íløgukarmum innan kloakkir í 2015 konta 6875 (kloakkir) L 68018 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráð.

**Tekniska nevnd 07. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býáðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

# 12/15 Kirkjugarðar løgur í 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 9/15 | 15/00018-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 6/15 | 15/00018-2 |
| 3 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 12/15 | 15/00018-2 |

Lýsing av málinum – samandráttur
Víst verður til mál um víðkan av gravøki í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin mál nr. 14/02585.

Talið á jarðarferðum veksur ár um ár og um tvey ár er neyðugt at hava nýtt øki tøkt at jarða í.

Býráðið samtykti 22. mai 2014 at góðkenna fyriliggjandi heildarskitsuuppskot til staðseting og skipan, umframt at veita loypandi 3 mill. kr um árið av íløgum til projektering, útbjóðingartilfar og fremjing av ætlan.

Á fíggjarkarminum fyri løgur eru íalt tøkar kr. 1.000.000 til kirkjugarðar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at játtaðar verða kr. 1.000.000 av løgu fíggjarkarminum til kirkjugarðar, og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

Lýsing av málinum – samandráttur
Víst verður til mál um víðkan av gravøki í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin mál nr. 14/02585.

Talið á jarðarferðum veksur ár um ár og um tvey ár er neyðugt at hava nýtt øki tøkt at jarða í.

Býráðið samtykti 22. mai 2014 at góðkenna fyriliggjandi heildarskitsuuppskot til staðseting og skipan, umframt at veita loypandi 3 mill. kr um árið av íløgum til projektering, útbjóðingartilfar og fremjing av ætlan.

Á fíggjarkarminum fyri løgur eru íalt tøkar kr. 1.000.000 til kirkjugarðar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at játtaðar verða kr. 1.000.000 av løgu fíggjarkarminum til kirkjugarðar, og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at játta kr. 1.000.000 av framfluttum løgukarmi til kirkjugarðar 2014 og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

## 13/15 Íløgujáttan til lendisgøtur í 215

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 10/15 | 15/00030-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 7/15 | 15/00030-1 |
| 3 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 13/15 | 15/00030-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Vísandi til mál um lendisgøtur nr. 14/00983, um skipanarætlan og framløgu á fundi tann 6. november 2013, um raðfesting av arbeiðum og til býráðssamtykt, tann 27. november 2014, í fíggjarætlanini fyri 2015, mál nr. 14/04304, at tilluta kr. 960.000 á konto 6275 til lendisgøtur:

| | |
|---|---|
| Liðugtgerð av Bráanshellugøtuni frá vatnbrunninun til Kleynsvarða | 310.000 kr |
| Kirkjubøargøtan frá Havnardali til Reynsmúlan | 225.000 kr |
| Reynsmúlin til Kirkjubøar 3,8 km ábøtur | 300.000 kr |
| Annað | 125.000 kr |
| Tilsamans | 960.000 kr |

Fíggjarlig viðurskifti:
Á fíggjarætlanini fyri løgur 2015 eru avsettar til lendisgøtur kr. 960.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at játtaðar verða kr. 960.000 av løgu fíggjarkarminum til lendisgøtur, og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at játta kr. 960.000 av framfluttum løgukarmi til lendisgøtur 2014 konto 6275 og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

# 14/15 Uppskot til útstykking við dúpulthúsum á Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 35/14 | 14/04565-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.10.2014 | 49/14 | 14/04565-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 12.11.2014 | 296/14 | 14/04565-1 |
| 4 Býráðsfundir | 20.11.2014 | 230/14 | 14/04565-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 91/14 | 14/04565-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 07.01.2015 | 9/15 | 14/04565-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 5/15 | 14/04565-1 |
| 8 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 8/15 | 14/04565-1 |
| 9 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 14/15 | 14/04565-1 |

**Útstykking í ovara parti av Karlamagnussarbreyt, millum Rólandsgøtu og Ólivantsgøtu, Hoyvík.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Øki talan er um er partur av projektinum Karlamagnussarbreyt og er talan um ovastu vinnustykkini, matr. nr. 135nm, 135no, 135nq, 135np, 135nn og 135nl, umframt 135nr sum er útlagt til parkering o.a. og matr. nr. 135ns, sum er fríøki.

Tekniska nevnd samtykti á fundi 30. apríl 2014, at mæla býráðnum til at broyta byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt soleiðis, at stykkini nr. 46, 48, 50, 51, 52 og 53 oman fyri Rólantsgøtu verða løgd til bústaðarbygging. Býráðið samtykti 22. mai 2014 at taka undir við teknisku nevnd.

Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot, har økið verður lagt út til bygging av dupulthúsum.

Íalt verða 8 dupulthús, ella 16 húsaeindir. Stykkini til hvørja húsaeind verða millum 300 og 400 m².

Útstykkingin verður skipað soleiðis, at tað verða 4 bólkar við 4 húsaeindum í hvørjum, við felags atkomuvegi, sum eisini kemur at virka sum felagsøki.

Samlaða víddin er 5476 $m^2$.

Samlaði keypsprísur fyri verandi lendi er settur til kr. 6.407.468, sum svarar til 1170 kr./$m^2$.

Økið er planerað og har eru nakrir stuðlamúrar. Roknast skal við, at stuðlamúrarnir skulu takast burtur og nakað av planeringini gerast um.

Tekniskar installatiónir eru lagdar inn á økið, men kannast má hvussu nógv av hesum má gerast um og/ella gerast afturat.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Øki liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Øki er eisini umfata av serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnussarbreyt.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Sí omanfyri

Neyðugt er at gera serstaka byggisamtykt fyri øki.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Kommunan eigur øki og kemur at hava útreiðslur og inntøkur av hesum.
Í sambandi við at økið skal broytast frá at verða miðstaðarøki til bústaðarøki, verða nakrar útreiðslur til byggibúningararbeiði, tekniskar innleggingar, ummatrikkulering o.a.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Hevur ikki enn verið hjá øðrum deildum

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Hevur ikki enn verið hjá øðrum myndugleikum

**Skjøl:**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
*Uppskot, j.nr. 2014-4565/1*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin til komandi fund útgreinar ætlanina nærri, ger uppskot til serstaka byggisamtykt og lýsir hvussu stykkini kunnu seljast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.**

**Ískoyti:**
Vanliga verða tvíhús bygd av einum byggimeistara, sum tvey eins speglvend hús við einum eldverjuveggi ímillum, og síðani seld.

Býarskipanadeildin hevur herundir uppsett tríggjar leistir fyri fremjan av útstykkingini við tvíhúsum:

1. Grundstykkini verða bjóðað út einkultvís til fólk, sum standa á bíðilistanum. Síðani er tað upp til eigararnar av hvørjum tvíhúsi at semjast um at gera eina ætlan og standa fyri byggingini. Um henda loysnin verður vald, má roknast við, at fólk ikki eru samd um hvussu húsini skulu byggjast og síggja út. Hetta kann gera tað trupult at málsviðgera umsóknir um byggiloyvi. Henda loysnin krevur tí eina serstaka byggisamtykt, har allir smálutir eru gjølla greinaðir, fyri at fáa eitt gott úrslit.

2. Kommunan letur projekt gera til øll tvíhúsini. Grundstykkini verða lutað út til fólk, sum standa á bíðilistanum saman við við projektinum. Síðani gera tvey og tvey avtalu við byggimeistara um bygging av húsunum. Hetta krevur ikki so nógv av serstøku byggisamtyktini, tí at kommunan stendur sjálv fyri projekteringini, sum kann lagast eftir ynskjunum hjá kommununi. Kommunan hevur tó ikki altíð havt líka góðar royndir við at blanda seg ov nógv uppí privata bústaðabygging.

3. Grundstykkini seljast til ein ella fleiri byggimeistarar, sum gera projekt og byggja húsini fyri at selja til fólk, sum standa á bíðilistanum. Hetta krevur ikki so nógv av serstøku byggisamtyktini, bert ásetingar av vídd, hædd v.m., og at projekt skal gerast í samráð við kommununa.

Býarskipanardeildin mælir til, at útstykkingin verður gjørd sambært leisti nr. 3, har økið verður selt til ein ella fleiri byggimeistarar, sum byggja og selja húsini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið við Karlamagnusarbreyt millum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu. Henda serstaka byggisamtykt er gjørd við grundarlagi í, at nevndin velur at fremja ætlanina eftir modell nr. 3. Um samtyktin hjá nevndini er, at velja leist nr. 1, er neyðugt at gera eina byggisamtykt við fleiri og gjølligari ásetingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
- at nevndin tekur støðu til, hvussu útstykkingin skal fremjast eftir teimum trimum leistum, sum eru lýstir omanfyri.
- at ovasti parturin av Karlamagnusarbreyt av serstøku byggisamtyktini við Karlamagnusarbreyt verður tikin burtur úr serstøku byggisamtyktini.
- at ein nýggj serstøk byggisamtykt fyri økið við Karlamagnusarbreyt millum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu verður samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. oktober 2014:** Nevndin samtykti:
at útstykkingin verður framd eftir leisti 1, har stykkini verða bjóðað út einkultvís til fólk, sum standa á bíðilistanum.
at treytir um vegg millum húsini, hæddir o.a. verður tinglisið í skeytinum.
at kommunan fær gjørt eitt útstykkingarprojekt.
at tá stykkini eru lutaði út, verður eigarafelag gjørt, sum kemur at standa fyri at fáa verkætlanina gjørda.

Eisini samtykti nevndin:
at ovasti parturin av Karlamagnusarbreyt verður tikin burtur úr serstøku byggisamtyktini.
at góðkenna uppskotið til nýggju serstøku byggisamtyktina fyri økið, við fylgjandi broytingum:
- §4, stk. 4.3, verður breiddin á bilhúsi broytt til 4,0 m
- §4, stk. 4.4 um hædd á bilhúsi verður tikið burtur.

**Fíggjarnevnd 12. november 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 20. november 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til ferðsluviðurskiftini skal málið viðgerast í ferðslunevndini.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti. Málið beint í teknisku nevnd.

**Tilmæli til teknisku nevnd 7. januar 2015:**

Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við ferðslunevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting av verkætlanini, sum fevnir um umlegging av verandi útstykking til liðugt planerað grundstykki til tvíhús, og umlegging av leiðingum.

**Kostnaðarmeting:**

| | |
|---|---|
| - Umlegging av útstykking | 3.043.410,00 kr. |
| - Prosjektering | 100.000,00 kr. |
| - Byggileiðsla og eftirlit | 120.000,00 kr. |

Viðvíkjandi útrokning av søluprísinum á grundstykkjunum, verður víst til viðhefta kostnaðaryvirlit.

HMP-consult hava projekterað verandi útstykking, sum er eitt miðstaðarøki, og verður tí mælt til, at teir fáa til uppgávu at umprojektera hendan partin til tvíhús. Teir hava givið kommununi eina meting uppá arbeiðið fyri kr. 100.000,00.

Prosjekteringin tekur væntandi ein mánað, og treytað av at farið verður undir prosjekteringina beinan vegin, kann útstykkingin vera liðug, soleiðis at keyparar kunnu fara undir at byggja hús í september/oktober 2015.

**Viðheft er:**
j.nr. Uppskot til skeyti
j.nr. Uppskot til matrikulætlan
j.nr. Kostnaðarmeting fyri prosjektering
j.nr. Kostnaðaryvirlit fyri kostnaðin av grundstykkjunum.

Við niðanfyri tilmæli, verður mælt til at fara undir projektering áðrenn serstaka byggisamtyktin er broytt og verður hetta gjørt fyri at skunda undir ætlanina. Serstaka byggisamtyktin er kunngjørd og seinasta freist at koma við viðmerkingum er 19. januar og verður síðani send Fiskimálaráðnum til góðkenningar.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina 9. januar 2015:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til, at farið verður undir at gera projekt, útgreinaða kostnaðarmeting og tíðarætlan beinanvegin. Eisini verður mælt til, at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 100.000 sum útlegg til projektarbeiði, og at HMP-consult fær arbeiðið at gera umprojekteringina.

**Tekniska nevnd 07. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

## 15/15 Bacalao selur ísvirkið á Vestaru bryggju til Sp/f Barðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 12.01.2015 | 2/15 | 14/04827-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 9/15 | 14/04827-4 |
| 3 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 15/15 | 14/04827-4 |

**Málslýsing**:
P/F Langasker, sum er eitt dóttirfelag hjá P/F Bacalao, hevur gjørt avtalu við Sp/F Barðið, sum rekur landingarmiðstøðina á Vestaru bryggju, um at Sp/F Barðið keypir ísvirkið.

Ísvirkið stendur á matr. nr. 971l, sum Tórshavnar havn er eigari av.

Økið verður framhaldandi brúkt sum grundøki til bygning, ið framleiðir ís til niðurkøling av fiski o.l, og er hetta í samsvar við byggisamtyktina.

Í uppskotinum til nýggjan leigusáttmála við Sp/F Barðið, er leigutíðin sett til 15 ár, tá tað er møguligt at leingja leigumálið við 10 árum, um so er at Tórshavnar havn ikki ynskir at taka grundøkið til egið brúk.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at gera leiguavtalu við Sp/f Barðið, sambært uppskoti til leigusáttmála.

**Vinnunevndin 12. januar 2015:** Samtykt at taka undir við sáttmálanum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

# 16/15 Broyting í upptøkureglunum á dagstovnaøkinum (smábarnastovur)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 7/15 | 15/00122-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 14/15 | 15/00122-1 |
| 3 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 16/15 | 15/00122-1 |

**Málslýsing**:
Tørvur er á at endurskoða upptøkureglurnar til dagstovnarnar í kommununi.

§ 6 í upptøkureglunum sigur, at barnið fer úr vøggustovu í barnagarð, tá tað er 3 ára gamalt:

> *Vøggustovu – ella barnagarðsbørn: Børn, ið fylla trý ár millum 1. januar og 31. oktober í upptøkuárinum, verða mett sum barnagarðsbørn alt upptøkuárið.*
> *Foreldur kunnu, í samráð við stovnsleiðarar, í hvørjum einstøkum føri gera av, um barnið skal verða verandi í vøggustovu, tí tað ikki er búgvið at fara í barnagarð. Eisini kunnu børn, ið fylla trý ár eftir 31. oktober, fara í barnagarð, um tey eru búgvin til tess.*

Upprunaliga eru allir dagstovnar í kommununi skipaðir við stovum, ætlaðum vøggustovu- ella barnagarðsbørnum. Nógvir stovnar hava lutfalsliga nógv barnagarðsbørn í mun til vøggustovubørn. Eitt nú hava býlingshúsini 3 stovur: eina vøggustovu við 12 børnum og tvær barnagarðsstovur við í alt 40 børnum. Tá býlingshúsini vórðu bygd, var hetta eitt skilagott býti, tí nógv smábørn vóru í dagrøkt. Seinnu árini er barnatalið minkað og dagrøktirnar vorðnar færri. Síðani í summar hevur kommunan ikki bjóðað dagrøkt.

Ein avleiðing av gongdini er, at býtið av vøggustovu- og barnagarðsplássum ikki longur svarar til tørvin. Stórur tørvur er á vøggustovuplássum, meðan kommunan hevur tøk barnagarðspláss. Fleiri stovnsleiðarar hava longu roynt at gjørt tillagingar og skipað eina ella fleiri stovur soleiðis, at børn í vøggustovu- og barnagarðsaldri eru á somu stovu.

Oftast verður hetta gjørt við sokallaðum miðlingastovum – ella blandaðum stovum, har elstu vøggustovubørnini og yngstu barnagarðsbørnini eru saman. Hetta er ein góð loysn, tí tað ger tað smidligari í mun til tørvin. Samstundis er hetta fakliga ein fullgóð skipan.

Tí hevur barna- og ungdómsdeildin eisini eggjað stovnsleiðarum, sum hava havt tøk barnagarðspláss, til at skipa blandaðar stovur. Dentur hevur verið lagdur á, at talan framvegis er um eitt ávikavist vøggustovu- og barnagarðstilboð, skilt soleiðis, at starvsfólkaorkan (normeringin) til barnið svarar til vøggustovu, so leingi barnið er í vøggustovualdri. Hetta merkir samstundis, at foreldrini rinda vøggustovugjald.

Upptøkureglurnar eru ikki dagførdar í hesum sambandi og tørvur er á at fáa blandaðar stovur formfestar í mun til foreldragjaldið. Ætlanin er, at upptøkureglurnar skulu gera tað møguligt at skipa dagstovn sum samansjóðaðan stovn, har tað er aldurin á barninum, sum er avgerandi fyri, nær talan er um eitt vøggustovupláss ella barnagarðspláss. Tað skal framhaldandi verða møguligt at skipa stovnin á siðbundnan hátt við reinum vøggu- og barnagarðsstovum. Stovnsleiðarin skal saman við barna- og ungdómsdeildini staðfesta, hvørji meginreglu stovnurin fylgir, og foreldrini skulu kunnast í sambandi við, at tey søkja um stovnspláss.

Mentamálaráðið skal góðkenna broytingar í upptøkureglunum. Í einum føri, tá stovnsleiðari og foreldur vóru ósamd um foreldragjald, kærdu foreldrini til MMR og niðurstøðan var tá, at MMR sum so onki hevði ímóti blandaðum stovum, men kravt varð, at blandaðar stovur vóru at síggja á upptøkureglunum hjá kommununum. Blandaðar stovur eru vanligar eitt nú í donskum kommunum.

Samstundis verður innleiðandi reglan í verandi grein 6 um, at '*Børn, ið fylla trý ár millum 1. januar og 31. oktober í upptøkuárinum, verða mett sum barnagarðsbørn alt upptøkuárið'* strikað. Orðingin kann tykjast ógreið, men reglan hevur verið tulkað soleiðis, at børn, ið fylla 3 ár í seinasta lagi 31. okt. og framvegis ganga í vøggustovu, tí ongin tøk barnagarðspláss eru, rinda barnagarðsgjald frá august mánaði, tað árið, tey fylla 3 ár.

Skotið verður upp, at grein 6 verður orðað soleiðis:

***Á stovnum, sum eru skipaðir við vøggustovu og barnagarði, fer barnið í barnagarð, tað árið barnið fyllir 3 ár. Í tann mun tað ikki er pláss fyri, at øll tey 3 ára gomlu byrja í barnagarði aftaná summarfrítíðina, verða tey flutt so hvørt tað eru tøk barnagarðspláss á stovninum. Foreldur rinda ávikavist vøggustovu- ella barnagarðsgjald, svarandi til hvar barnið er.***

***Um foreldur og stovnsleiðari meta, at barnið ikki er búgvið at fara í barnagarð, kann barnið verða verandi longri í vøggustovu.***

***Er dagstovnurin skipaður við blandaðum stovum, rinda foreldur vøggustovugjald til barnið fyllir 3 ár. Frá og við mánaðinum, barnið fyllir 3 ár, verður rindað barnagarðsgjald. Aldurin á barninum er ikki avgerandi fyri, á hvørji stovu barnið er.***

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at taka undir við at broyta grein 6 í upptøkureglunum samsvarandi uppskotinum omanfyri.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

# 17/15 Óbygt grundstykki. Matr. nr. 50z, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 18/15 | 14/03351-11 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 14/03351-11 |
| 3 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 17/15 | 14/03351-11 |

**Málslýsing**:
Talan er um óbygt grundstykki, sum er til víddar 761m². Skeytið er tinglýst 07.01.2005. Keypsprísur íroknað tinglýsing og skeytiskostnað, er kr. 195.741,88.

Eigarin hevur fingið rykkjara 3 frá kommununi. T.v.s. at hann er biðin um at afturskeyta kommununi grundstykkið.

Verandi eigari hevur fyri stuttum keypt eitt grundstykki í Tórshavn og hevur bygt sethús á grundstykkið. Ætlanin um at byggja sethús á Velbastað er slept.

Hann søkir tí kommununa um loyvi til at selja grundstykkið á Velbastað í fríari sølu. Um hetta ikki letur seg gera, ynskir hann, at kommunan veitir honum ávíst endurgjald. Hann vísir til, at Fnskúlin á Velbastað hevur brúkt stykkið í fleiri ár.

Sí áheitan 14/03351- 7 og fundarfrágreiðing 14/03351-10.

Sambært treytunum í skeytinum kann eigarin ikki uttan loyvi selja ognina víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum. Eisini er galdandi, at áðrenn 2 ár frá tí, at skeytið er tinglýst, skulu sethús verða bygd á ognini. Annars kann seljarin ( t.v.s. kommunan ) krevja stykkið aftur, ímóti at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur.

**Tilmæli**:
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla frá at loyva víðarisølu av ognini.

Í staðin verður mælt til at kommunan heldur fast við kravinum um, at eigarin afturskeytar kommununi grundstykkið, sí annars treytirnar í skeytinum, og at selja grundstykkið aftur í fríðari sølu.

Kommunan keypir stykkið aftur fyri kr. 190.250,00

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Einmælt samtykt.

# 18/15 Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.06.2014 | 28/14 | 14/00896-7 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 166/14 | 14/00896-7 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 139/14 | 14/00896-7 |
| 4 Vinnunevndin | 12.01.2015 | 3/15 | 14/00896-7 |
| 5 Vinnunevndin | 20.01.2015 | 4/15 | 14/00896-7 |
| 6 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 24/15 | 14/00896-7 |
| 7 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 18/15 | 14/00896-7 |

## Málslýsing:

**Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki.**
Seinasta stóra havnaútbyggingin í Tórshavn, var liðug í 1997, tá tann uttasti parturin av molanum varð breiðkaður. Hendan útbyggingin bleiv gjørd í tøkum tíma, tí bingjuflutningurin er støðugt vaksin síðani.

Síðani útbyggingina í Tórshavn í 1997, er havnarlagið í Kollafirði munandi útbygt. Útbyggingarnar í Kollafirði og á Oyrareingjum hava skapt nógv virksemi. Tørvurin á størri útbyggingum er ikki akuttur í løtuni, men hann kann vísa seg seinni.

Undantikið tað, sum verður uppskipað á Oyrareingjum, kemur allur innflutningur til Føroyar, sum kemur við bingjum og trailarum, um bryggjuna í Tórshavn. At bingjuhavnin liggur í Tórshavn ger, at flutningurin til nógv tann største partin av forbrúkarunum er stuttur.

Verðandi umstøður á Eystaru bryggju eru langt frá optimalar, tí:

- **Dýpið fram við Eystara mola og innsiglingin er ov lítið**. Hetta viðførir at tá verðandi bingjuskip liggja við bryggju, er neyðugt at leggja fendarar millum skipið og bryggjuna. Hetta er ikki nøktandi, og ger tað ómøguligt at fáa størri bingjuskip til bryggju, enn tey verðandi. Alt fleiri ferðamannaskip, sum sigla á okkara leiðum, kunnu ikki koma til bryggju, tí dýpið er ov lítið.
- **Kajplássið, serliga um summarið, er sera avmarkað.** Hetta merkir at vit ikki kunnu avgreiða ferðamannaskipini og bingjuskipini samstundis, og tað er ómøgulig at vaksa um møguligt annað virksemi.
- **Økið til bingjur og trailarar er ov lítið.** At økið til bingjur og trailarar er ov lítið, viðførir at arbeiðsgongdin ikki er nøktandi og tað blíva alt ov nógvar flytingar.
- **Økið til pakkhús o.a. er ov lítið.** Fyri ikki at minka um verðandi bingjuøki, ber ikki til at byggja goymslubygningar o.a. sum tørvur er á til havnavirksemið.
- **Økið til avgreiðslu av ferðafólki og bilum er ov lítið.** Tað er ov lítið pláss at avgreiða ferðafólk og bilar, serliga um summarið. Ein víðkan av havnaøkinum, hevði gjørt tað møguligt at umskipa økið rundan um farstøðina, soleiðis at betri pláss var til tey ferðandi.

Einasti møguleiki at betra munandi um umstøðurnar á Eystaru bryggu í Tórshavn, er at leingja molan á Skansabryggjuni, og at víðka verðandi øki suðureftir og eystureftir.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at býráðið velur 2 býráðslimir í bygginevndina

- at bygginevndin ger byggiprogram.
- beinanvegin at seta í verk árinskanning, hydrauliskar kanningar og at fáa til vega neyðug loyvir.
- at kanningar og fyrireikingar, upp til 3 mió. verða goldnar av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 30. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 30. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við einari atkvøðu fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at velja Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurdsson í bygginevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

**Bygginevndin hevur havt 10 fundir, og hevur hesar viðmerkingar:**

**Grótbrot:** Grótið til uppfyllingina, sum er umleið 80.000 $m^2$ verður tikið á sama stað sum til seinastu havnaútbyggingina, við at víðka verðandi grótbrot á Glyvursnesi suðureftir.
Yvirfriðingarnevndin hevur góðkent, at grótbrotið verður víðkað.
Avtala um gróttøku er ikki gjørd við Búnaðarstovuna enn.

**Aldusimuleringar:** DHI hevur gjørt aldusimuleringar av, hvussu kyrt tað verður í tí nýggju- og verðandi havnini , tá útbyggingin er liðug. Kanningarnar vísa, at kyrran í tí nýggju havnini verður umleið tann sama, sum tað er í verðandi havn í dag. Kanningin vísir eisini, at aftan á ýtbyggingina, verður tað munandi kyrrari í verðandi havn.
Útbyggingin hevur eisini ein positiva ávirkan á Álaker og Argir, serliga á landnyrðingi.

**Grótkast:** Fyri at kunna taka støðu til hvussu sjálvt grótkastið skal byggjast , eru ávegis kanningar gjørdar hjá DHI.
Ávegis kanningarnar vísa, at tann norðari parturin av grótkastinum skal vera nakað hægri enn verðandi moli.
Fyri at fáa endaliga staðfest, hvussu uppbyggingin av molanum skal verða, er neyðugt at gera eina modelroynd, sum verður liðug í september 2014.

**Sandagerð:** Kanningar vísa, at útbyggingin ikki hevur nevniverduga ávirkan á sandin í Sandágerði.

**Havnalagið:** Fyri at fáa skapið á havnalagnum at hóska so væl til landslagið sum til ber, er nógv orka, saman við arkitekti, brúkt upp á at fáa tað rætta skapið.
Uppskotið er ein samlað víðkan av havnalagnum upp á umleið 163.000 $m^2$, við einari atløgusíðu upp á umleið 700 m

**Skansin:** Fyri at fáa eina so góða loysn sum til ber, hevur verið samskift við Fornminnisnevndina.
Tað hevur verið týdningarmikið, at umhvørvið rundan um Skansan, aftan á útbyggingina, skal verða eitt trivnaðarøki.
Nýggja havnalagið er umleið 50 m leyst av fjøruni undir Skansanum, har møguleiki er at leggja smábátar.

**Friðingarmyndugleikar:** Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 10. juni 2014 samtykt at geva loyvi til útbyggingina.

**Árinskanning:** Tá bygt verður so út á sjógv, er neyðugt at gera eina árinskanning. Hetta er ein umfatandi kanning, sum lýsir hvørja ávirkan útbyggingin hevur á umhvørvið.
Rambøl hevur gjørt kanningina, sum aftaná at býráðið hevur samtykt tað, verður send til umhvørvisstovuna.
Tað er Umhvørvisstovan sum endaliga góðkennir ætlanina.

**Broyting av byggisamtykt:** Neyðugt verður at víðka verðandi byggisamtykt til eisini at fevna um nýggja havnalagið. Uppskot um hetta, eigur sum skjótast at verða lagt fyri nevnd.

**Framhaldandi fyrireiking:** Fyri at kunna gera tær endaligu fyrireikingarnar áðrenn støða verður tikin til at projektera, er neyðugt at gera modelroynd av nýggja molanum.
Eisini er neyðugt at gera byggiprogram.

Tað eru áður jattaðar 3 mió til fyrireikingar. Neyðugt er at játta 1 mió. afturat, soleiðis at møguligt er gera modelroyndina og byggiprogrammið.
Hetta arbeiðið eigur at verða liðugt í oktober.

**Tilmæli:**
Havnameistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja, at VVM kanningin verður send til Umhvørvisstovuna til góðkenningar, tá hon er liðug.

Mælt verður eisini til at játta 1 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn til fyrireiking og ger av byggiprogrammi.

**Vinnunevndin 16. juni 2014:** Samtykt taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø og Sigrún Mohr,

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**

**Støðulýsing**

**Árinskanningin,** hevur verið til hoyring. Viðmerkingar til hoyringsskrivini verða í løtuni viðgjørd. Tá viðgerðin er liðug, verður hon løgd fyri býráðið, og eftirfylgjandi send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Modelroyndin,** sum vísir hvussu grótkastið skal uppbyggjast er liðug.

**Byggiprogrammið** er gjørt.

Um arbeiðið skal kunna bjóðast út í 2015, má projekteringin byrja nú. Uppskot til avtalu um projektering er gjørt við LBF, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja uppskot til byggiprogram.

Eisini verður mælt til at játta 6 mió. kr. til projektering og forkanningar.

**Vinnunevndin 12. januar 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 20. januar 2015:** Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at samtykkja, at aðrir møguleikar fyri víðkaðari góðshavn í kommununi verða gjølla kannaðir við atliti at kostnaði og umstøðum annars, áðrenn byggiskrá verður samtykt og peningur játtaður til at projektera

ætlaðu útbygginina av Skansabryggjuni og Eystara havnarøki í Havn. Víst verður til framløgd skitsuuppskot d.d. um havnarbygging á Sundi.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Rúni Djurhuus | Sjúrður Olsen |
| | Sigrún Mohr | |